# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## EDITH MÁLAR SINN OG NÁTTÚRU

Í hesum døgum hevur Edith Mørkøre framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Á framsýningin verður abstrakt og ekspressionistisk list at síggja. Íblásturin til málningarnar á framsýningini hevur hon út frá viðurskiftum, sum rørast í dagliga lívinum og hendingum sum hon ella onnur rundan um hana koma út fyri. Náttúran, vøkstur og árstíðirnar eru eisini við til at geva Edith íblástur fyri tíðin, og hon heldur, at sinnið og náttúran hava nógv til felags og renna saman í eina størri eind.

**EDITH MØRKØRE**
Smiðjan í Lítluvík
25/11-1/12



## LEITA EFTIR BESTA DJ

Seinnu árini hevur rákið innan DJ'ing vundið uppá seg. Vit síggja fleiri og fleiri DJ'arar gera um seg í tónleikaheiminum, og tíðarinnar rák hevur lyft hesar uppá sama støði sum tónleikarar, sum spæla sítt ljóðføri. Vit síggja túsundtals fjepparar kring allan heim fylkjast um hesar ljóðsnillingar, sum eitt nú Trentemøller, Tiesto og aðrar. Nú skal besti DJ í Føroyum finnast. Kappingin byrjaði um vikuskiftið og heldur fram komandi vikurnar.

**FØROYA BESTI DJ**
Ítróttarhøllin á Hálsi
Leygarkvøldið 27/12




## GUD OG AMERIKANSKI DREYMURIN

Teitur Lassen hevur langt síðani vunnið út um landoddarnar við sínum tónleiki, og fyri seinastu útgávuna fekk hann millum annað 5 stjørnur í stórum enskum dagbløðum. Nú hevur Teitur givið nýggja fløgu út, har hann millum annað hugleiðir um amerikanska dreymin, um Gud og um at taka lívið, sum tað kemur.

**TEITUR**
Let The Dogs Drive Home




## HVØR KANN ELSKA EITT ÓDJÓR?

Ein stórsligið Disney-ævintýr um prinsin, sum verður raktur av einum forbannilsi. Hann verður til eitt ódjór, og útsjóndin ræðir fólk. Einasti mátin, hann kann sleppa burtur úr sínari vanlukkuligu støðu, er, um hann finnur onkran, sum elskar hann fyri tað, hann er. Men hvør kann elska eitt ódjór?

**SKØNHEDEN OG UDYRET**
dvd-filmur



## JÓLABYGDIN TENDRAR

Sunnudagin tendrar jólabygdin Æðuvík. Seinastu 9 árini hevur nógv verið gjørt burtur úr jólahaldinum í Æðuvík. Húsini verða pyntað við perum og jólapynti sum onga aðrastaðni í Føroyum, og fólk koma langvegis frá fyri at síggja jólabygdina í fullum blóma í desember. Sunnudagin tendra tey kontaktirnar í Æðuvík.

**JÓLABYGDIN TENDRAR**
Æðuvík
Sunnudagin 28/11 kl. 19.00




## LIVERPOOL Í TOPPDYSTI

Enska stórfelagið hevur ikki spælt toppdystir í ensku kappingini higartil í ár, men í Europa League liggja teir á odda í sínum bólki. Liverpool er trý stig framman fyri Steaua Bukarest, og hóskvøldið bresta jústs hesi feløgini saman í toppdysti í Bukarest. Við sigri kann Liverpool tryggja sær heitið sum bólka vinnari, meðan Steaua Bukarest kann toga seg upp undir liðina á Liverpool við einum sigri.

**STEAUA BUKAREST-LIVERPOOL**
Europa League
Hóskvøldið 2/12 kl. 18.00